Kommunufelagið

Dagfesting
7. mai 2015

**Til limirnar**
**Att.: sosialu deildirnar**

Okkara j.nr.
14/00690-25

Málsviðgeri
Sveiney Sverrisdóttir

**Viðv. Kick-off hjá Tí góðu tilgongdini, samskipan av børnum við gruna at bera autismu**

Kommunufelagið bjóðar til kunnandi fundar 21. mai, kl. 10:00 til ca.15:00. í veisluhøllini á Landsjúkrahúsinum.

Fundurin, sum er ætlaður starvsfólkum á sosialu deildunum og dagstovnaleiðarum, er liður í at byrja ymis tiltøk sum politiski myndugleikin - Almannamálaráðið, Heilsumálaráðið, Mentamálaráðið og Kommunufelagið, hevur samtykt at seta í verk til at gera umstøðurnar betri hjá foreldrum at børnum sum gruni er um at bera autismu.

Vegna fyrireikingina, er neyðugt við tilmelding. Freistin at boða frá luttøku er 13. mai, kl. 12:00 á t-post sveiney@kf.fo. Tilmeldingargjald er 100 kr. pr. luttakara. Rokning verður send aftaná tilmelding.

Fundarskrá:

1. Um tá góðu tilgongdina, Kick-off. Almannamálaráðið og Autismufelagið.
2. Um samskipara- og ráðgevaraleiklutin hjá Almannaverkinum, við AV starvsfólki.
3. Um autismu og útgreiðing, við barnapsykiatara og leiðara í B&U, Psykiatriski depilin, LS.
4. Um mannagongdir tá fyribyrging ikki er nóg. Starvsfólk á Námsfrøðiligu ráðgevingini í Norðoyggjum kunna um sítt virksemi og um mannagongdir viðvíkjandi støðuni, tá meira skal til en fyribyrgjandi arbeiðið sum stovnurin ger skal til.
5. Um markamót millum námsfrøðina og sernámsfrøðina, Starvsfólk frá Sernám viðgera markamót millum dagstovn og Sernám.
6. Um at undirvísa næmingum innan autismuøkið, við starvsfólkum hjá fólkaskúlanum.
7. Um vegleiðingina um miðlan v.m. av persónsupplýsingum, við Kommunufelagnum.
8. Ymist.

Tilfar um Ta góðu tilgongdina fæst her. Kommunufelagið hevur gjørt uppskot um vegleiðing um miðlan v.m. av upplýsingum millum stovnar og til skúla, sum kann heintast her.